
Heilivágsskipan í Grønlendska heilsuverkinum

Fundur í Trivnaðarnevndini 26.10.2023

Fakta
Vídd: 2.175.600 kvadratkilometrar
Íbúgvar: 56.000
Heilsuverkið er til staðar í 73 býum/bygdum





Samanbering av útreiðslum:

Table 5.3.2 Total health care expenditure (EUR/capita) 2014

	Denmark	Faroe Islands	Green-land	Finland[1]	Iceland	Norway	Sweden
Public financing	4 105	2 997	3 062	2 695	2 831	5 790	4 141
Private financing	771	..	-	880	662	1 012	826
Total health care expenditure	4 876	..	3 062	3 576	3 494	6 802	4 967

1 Finnish data include Åland

Source: OECD HEALTH STATISTICS. FO, Statistics Faroe Islands; GL, Directorate of Health

Viðmerking: Um føroyska egingjaldið(privata fíggingin) varð roknað við er Føroyska heilsuverkið dýrari pr. íbúgva enn tað Grønlendska .

Viðurskifti sum trýsta útreiðslurnar uppeftir í Grønlandi samanborið Føroyar:

- Stóra fjarstøðan og spjæddu búsetingarnar føra við sær:
  - At tað verður nýttar lutfalsliga stórar upphæddir itl flutning og evakurering.
  - At tilbúgvingin er lutfalsliga nógv størri (til staðar í 73 bygdum og býum spjæddar yvir landið)
  - At tað er trupult at fáa stórrakstrarfyrimunir
- Stóru sosialu avbjóðingarnar og lága útbúgvingarstøði føra við sær:
  - Størri trýst á sjúkrahúsverkið (se Deloitte-rapport)
  - Lutfalsliga nógva vikarnýtslu

Viðurskifti sum toga útreiðslurnar niður samanborið við Føroyar:

- Øll Heilsutænasta er ókeypis viðførir m.a.:
  - At allur heilivágur kann keypast til heilsøluprísir gjøgnum Amgros (amternes fællesindkøb af medicin) og er tí nógv bíligari
  - Møguligt at bróta pakningar upp og bara gev borgarunum júst tað talið sum er ordinerað.
  - At tað til dømis ikki er neyðugt við einum stovni, sum Heilsutrygd tá øll starvsfólk eru alment sett og heilvágurin ókeyðis.
- At íbúgvarnir er lutfalsliga yngri Grønlandi enn í Føroyum. Parturin av íbúgvum 65+ er í Grønlandi 8-9 prosent, meðan parturin er18-20 procent i hinum norðurlondum.
- Skynsom organisering har alt Heilsuverkið er undit einari leiðslu , og uppgávurnar sostatt verða loystar har tað er bes og bíligast.
- Størri nýtsla av telemedisinskum loysnum
- Skynsom stýring gjøgnum visitatiónsráð og heiligvágsráð.
- Lutfalsliga eitt lægri tænastustøði orsakað av ógvusligu avstandunum.

Lóggáva:

- Landstingsforordning af 6. november 1997 om sundhedsvæsenets ydelser m.v.,
- Landstingsforordning nr. 16 af 20. november 2005 om ændring af Landstingsforordning om sundhedsvæsenets ydelser m.v.
- Hjemmestyrets bekendtgørelse nr. 5 af 15. februar 2006 kapitel 4 om ydelser og brugerbetaling, samt Landstingsforordning nr. 1 af 12. maj 2005

Útreiðslur til heilivág í Grønlandi og Føroyum

- *Grønland:*
  - *Samlað innkeyp (2021) uppá **ca. 65 mio. kr** (einki egingjald)*
    - *1200 kr. pr íbúgva*
    - *3-4% av samlaðu heilsuútreiðslunum, sum er markant lægri enn í Danmark (17%), men eisini markant lægri enn í øðrum sambærligum londum.*
  - *Í 2008 vóru útreiðslurnar til heilivág:*
    - *907 kr. pr. íbúgva í Grønlandi*
    - *3.637 kr. pr. Íbúgva í Danmark.*
  - ***Kelda: Sundhedskommisionens betænkning maj 2023***
- *Føroyar:*
  - *Serstakur sjúkrahúsheilivágur 62,5 mió. kr. í 2021.(eksklusiv egingjald)*
  - *Heilsutrygd heilivágur 82,1 mió. kr. í 2021. (eksklusiv egingjald)*
  - *Apoteksverkið Keyp av vørum og tænastum 276 mió kr. í 2021*
  - ***Kelda: Fíggjarlógin 2023***